

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 01 - 2013

# Kinesararnir sleppa ikki til Føroya

Teir kinesisku arbeiðsmenninir, sum fáa uppihalds- og arbeiðsloyvi at arbeiða í teimum stóru verkætlanunum í Grønlandi, fáa ikki av sær sjálvum rætt til at fara til Føroya ella til Danmarkar. Tað sigur løgmálaráðið í Keypmannahavn í svari upp á fyrispurning frá fólkatingsmanninum Søren Espersen úr Danska Fólkaflokkinum. Hann vildi hava at vita, um teir kinesisku arbeiðsmenninir, sum ætlanin er at brúka í Grønlandi, fáa rætt til at fara til hinar partarnar av ríkisfelagsskapinum, Føroyar og Danmark. Í svarinum sigur løgmálaráðið, at í sambandi við tær stóru verkætlaninar í Grønlandi arbeiðir ráðið við einari nýggjari lóg, sum skal koma afturat verandi reglum í útlendingalógini. Í lógini, sum væntandi verður løgd fyri Fólkatingið í næsta mánað, verða millum annað reglur um innferðar- og útferðareftirlit. Danska stjórnin sleppur at svara nógvum spurningum afturat viðvíkjandi teimum stóru verkætlanunum í Grønlandi, tí fleiri tingmenn, teirra millum Søren Espersen, hava sett ymsum ráðharrum eina røð av spurningum í sambandi við námsætlaninar í Grønlandi.